T Ó R S H A V N A R  K O M M U N A

# Mentunarstuðul

## frá mentunarnevnd Tórshavnar býráðs

2 ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentunarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meira fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 25.oktober 2001. Merk umsóknina "Mentunarstuðul".

S N A R S K I V A N

# Maskinmeistari

## søkist

Søkt verður eftir tveimum maskinmeistarum til elverkið hjá SEV á Sundi.

Talan er um avloysarastørv fyri maskinmeistarar í farloyvi.
Viðkomandi skulu kunna byrja umleið 1. november 2001 ella so skjótt sum til ber.
Annað starvið verður sett fyri eitt ár, hitt fyri eitt hálvt ár fyribils.

Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til SEV tlf. 311366 (John P. Danielsen ella Bjarki Hermansen) ella til Osvald Hansen, verksmeistara á Sundsverkinum.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi skjótast gjørligt og helst innan 18. oktober 2001.

**Elfelagið SEV**

veitst tú ikki tað?

# Sandoyar Kvøldskúli

| Lærugrein: | Lærari | Kvøld | Tilmelding: |
|---|---|---|---|
| Handarbeiði | Maja Horn | Eftir avtalu | 361008 |
| Smíð | Jógvan Nicodemussen | Eftir avtalu | 361691 |
| Postalínsmáling | Súsanna Jensen | Eftir avtalu | 361528 |
| Veving | Anna K. Jacobsen | Eftir avtalu | 361758 - 361087 |
| Fimleikur | Jacquelina Bentzon | Eftir avtalu | 361170 |
| Seyming | Jonna Estbú | Eftir avtalu | 361652 |
| Orgulspæl | Vilhelmina Larsen | Eftir avtalu | 361164 |
| Teldulæra | Alexander Jespersen | Eftir avtalu | 361266 - 361323 |
| Føroysk rættskriving | Símun av Skarði | Eftir avtalu | 361617 |
| Horn- og beinarbeiði | Símun av Skarði | Eftir avtalu | 361617 |

Luttøkugjaldið er kr. 300,-.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku og myndugleikanna góðkenning.

**Sandoyar Kvøldskúli**


# M/B TURID til sølu

**Um hóskandi boð fæst, verður M/B Turid seld.**

**Báturin er bygdur í 1961 úr eik og bók og er 88,91 bruttotons.**

**Báturin verður seldur við øllum fiski- og veiðiloyvum**



**Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:**

**Heygum & Petersen**
Advokatar
Bøgøta 16
100 Tórshavn
Tlf. 351710 · Fax 351711

Sosialurin 311820



SJÓ-FRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22

Sosialurin - 311820



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820




**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Skipaeftirlitsfólk

Fiskimálastýrið søkir hervið eftir einum sjókønum skipaeftirlitsfólki til Skipaeftirlitið.

Skipaeftirlitsfólkið skal útinna sýnisarbeiði av skipum og havútbúnaði fyri tað almenna og arbeiðsuppgávurnar verða m.a. hesar:

- Tilsjón og tekniska málsviðgerð innan nautiska eftirlitsøkið og skipsbyggitekniska eftirlitsøkið við serligum atliti at fiskiskipum og ferðamannaskipum
- at hava eftirlit við teimum góðkendu klassingarfeløgunum o.ø. feløgum ella persónum, sum hava myndugleika ella eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum.

**Førleikakrøv:**
Til starvið sum skipaeftirlitsfólk krevst útbúgving sum:

- skipsverkfrøðingur ella verkfrøðingur, sum er serkønur innan sjóvinnu
- skipsførari við sjóvinnubrævi smb. 1600 BT (STCW, Reg. II/2) ella
- maskinmeistari við sjóvinnubrævi smb. 3000 kW (STCW, Reg. III/2)

Umsøkjarin skal hava minst 5 ára starvsroyndir innan viðkomandi øki.

Umsøkjarin skal harumframt hava:

- góð evni at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Í starvinum er møguleiki fyri at fáa skipaða grundútbúgving innan skipaeftirlit og verður sett sum eitt krav, um hetta ikki er lokið. Somuleiðis bjóðar Skipaeftirlitið eftirútbúgving.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Skipaeftirlitið.

Arbeitt verður í løtuni við at yvirtaka Skipaeftirlitið sum føroyskt málsøki. Sambært avgerð landsstýrismansins skal Skipaeftirlitið húsast í Vágum.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum.

Tað skal gerast vart við, at starvið verður sett treytað av, at neyðug játtan fyriliggur.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 2. november 2001, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra, ella Mary í Garði, fíggjarfulltrúa.

**Fiskimálastýrið**
Yviri við Strond 17 · Postsmoga 347
110 Tórshavn · Telefon 353030
Telefax 353035 · E-mail: fisk@fisk.fo


Sosialurin
www.sosialurin.fo


**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Deildarstjóri til Fiskimálastýrið

Í sambandi við at føroysku myndugleikarnir yvirtaka Skipaeftirlitið, og tað harvið verður sett á stovn ein nýggj deild í Fiskimálastýrinum, søkir Fiskimálastýrið eftir deildarstjóra til Skipaeftirlitið til setan skjótast gjørligt.

Tann nýggja deildin stendur fyri stórum og spennandi avbjóðingum í næstum, har Skipaeftirlitið við yvirtøkuni kemur at standa fyri tí tekniska og fyrisitingarliga partinum av málsøkinum trygd á sjónum.

Starvið er nýtt og verður rættiliga týðandi í sambandi við tær ætlanir og broytingar, ið fara at koma eftir yvirtøkuna av málsøkinum. Tað skal tí byggjast upp ein nýggj deild til ta nýggju fyrisitingina.

Nýggja fyrisitingin verður skipað sum deild í Fiksimáalstýrinum og skal, sambært avgerð landsstýrismanssins, húsast í Vágum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
Leiðsluna av Skipaeftirlitinum, herundir standa fyri:

- Lógarfyrireiking og -smíð: lóg um trygd á sjónum og kunngerðir
- Áseting av nærri reglum við heimild í lóg um trygd á sjónum, ið verða kunngjørdar í Fráboðanum frá Skipaeftirlitinum (regluverkið).
- Umsiting av samskiftinum við IMO og aðrar avvarðandi altjóða felagsskapir og stovnar.
- Umsiting og útinning av lóggávuni nevnd omanfyri, undir hesum útskriving av skipssertifikatum og neyðugt samstarv við vinnuna í hesum sambandi
- Tilsjón við nýbygging og umbygging av skipum
- Tilsjón við skipum, undir hesum kanningar av vanlukkum á sjónum v.m.
- Hava eftirlit við klassafeløgum og øðrum persónum/feløgum, sum hava myndugleikagóðkenning at gera sýn og útgeva sertifikatir myndugleika vegna.
- At veita landsstýrismanninum og Fiskimálastýrinum ráðgeving í sjóvinnumálum.
- At samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Førleikakrøv:**

- Viðkomandi útbúgving
- Tekniskt fakligan førleika og drúgvar royndir innan sjóvinnu og skipatrygd
- Kunnleika til almenna umsiting
- Leiðsluroyndir
- Góð evni at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 37. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálastýrið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin verður Skipaeftirlitið.

Starvsheitið er deildarstjóri og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum.

Tað skal gerast vart við, at starvið verður sett treytað av, at neyðug játtan fyriliggur.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 26. oktober 2001, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra, ella Mary í Garði, fíggjarfulltrúa.

**Fiskimálastýrið**
Yviri við Strond 17 · Postsmoga 347 · 110 Tórshavn
Telefon 353030 · Telefax 353035 · E-mail: fisk@fisk.fo